BRÚKARATORGIÐ

*Lagt til rættis:*
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

# Ójøvn góðska á fartelefonum



## Vel røttu fartelefonina

Tað kann vera ómetaliga ørkymlandi at velja røttu fartelefonina, tá prísurin skal samsvara við krøv og tørv. Ikki er ráðiligt at keypa fyrstu telefonina, tú kemur fram á, men at kanna marknaðin væl og virðiliga, áðrenn tú dregur Visakortið gjøgnum sleduna. Her er okkurt, sum tú kanst hava í huganum.

Ger tær greitt, hvønn tørv tú hevur. Ert tú ikki typan, sum brúkar myndatól ella spøl, er óneyðugt at rinda fyri hesar hentleikar.

Um stráluvirðið hevur týdning fyri teg, og hvørja telefon tú velur, so kanna SAR-virðið. Um stráluvirðið er lágt, sendir fartelefonin ikki so harðar elektromagnetiskar eindir. Í Danmark má SAR-virðið ikki vera hægri enn 2,0.

Hetta ráðið er ikki so umráðandi í Føroyum, men nógvir føroyingar keypa sær fartelefon í Danmark, og har er lætt at verða lumpað. Handlarnir lýsa ofta við óvanliga bíligum telefonum – heilt niður í 1 kr. Men slíkt kan lættliga gerast ein dýr søga, tí ofta bindur tú teg til eitt hald hjá telefyritøkuni. Og viðhvørt er haldið so kostnaðarmikið, at tað hevði loyst seg betur at keypt telefonina við ongum haldi. Minst til at kanna samlaðu útreiðslurnar í tíðarskeiðinum, sum haldið fatar um.

Royn fartelefonina áðrenn tú keypir hana. Royn knapparnar, haldgóðskunna og ljóðgóðskunna. Vegna stuldur, hava nakrir handlar kopitelefonir liggjandi frammi, men tú kanst altíð biða um at royna eina veruliga telefon.

Tak hædd fyri battaríinum. Tað er stórur munur á, hvussu leingi tú kanst brúka telefonina, uttan at løða hana.



**Sony Ericsson W800i er vinnari í nýggjastu kanningini hjá danska brúkararáðnum og ICRT, sum varð kunngjørd í januar 2006**

**Tónleikaspælari, myndatól og útvarp eru vanlig tilboð í nýggjastu fartelefonunum, og ljóðgóðskan er ofta vánalig.**

| Vøra | Heildarmeting | Lægsti fø. dagsprísur 03.03.2006 | Talutíð við GSM 900 mHz | Løðitíð (min) | Ljóðgóðska | Haldgóðska | SAR (W/kg) |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SONY ERICSSON W800i | •••• | 3495,- | 7 t. 12 min. | 160 | ••• | •••• | 0,67 |
| Nokia 6101 | •••• | 1745,- | 5 t. 15 min. | 119 | ••• | •••• | 0,82 |
| SAMSUNG SGH-E730 | •••• | 2895,- | 5 t. 58 min. | 179 | •••• | ••••• | 0,35 |
| NOKIA 6030 | •••• | 1045,- | 7 t. 02 min. | 180 | ••• | ••• | 0,7 |
| SAMSUNG SGH-E530 | •••• | 2945,- | 7 t. 19 min. | 105 | •••• | ••••• | 0,76 |
| SONY ERICSSON K600i | •••• | 3095,- | 7 t. 13 min. | 130 | ••• | •••• | 0,69 |
| MOTOROLA ROKR E1 | •••• | * | 7 t. 02 min. | 251 | ••• | ••• | 1,01 |
| NOKIA 5140i | •••• | 1675,- | 5 t. 02 min. | 77 | ••• | •••• | 0,77 |
| QTEK S110 | •••• | 5.595,- | 7 t. 11 min. | 150 | ••• | ••• | 0,41 |
| NOKIA 3120 | •••• | 899,- | 6 t. 10 min. | 285 | ••• | •••• | 0,79 |
| SONY ERICSSON K608i | •••• | * | 7 t. 13 min. | 130 | ••• | •••• | 0,78 |
| NOKIA 8800 | •••• | 6895,- | 4 t. 09 min. | 70 | ••• | •••• | 0,5 |
| SAMSUNG SGH-Z300 | •••• | 2995,- | 5 t. 45 min. | 115 | •••• | ••••• | 0,7 |
| NOKIA 9500 Communicator | •••• | 5.899,- | 9 t. 37 min. | 119 | ••• | ••• | 0,49 |
| NOKIA N90 | •••• | 5.390,- | 4 t 23 min. | 81 | •••• | •••• | 0,29 |
| SONY ERICSSON J300i | •••• | 900,- | 7 t. 27 min. | 146 | ••• | •••• | 1,02 |
| ALCATEL One Touch 757 | •••• | * | 6 t. 00 min. | 223 | ••• | •••• | 0,5 |
| SIEMENS CL75 | •••• | * | 5 t 09 min. | 162 | •••• | •••• | 0,66 |
| SIEMENS M75 | •••• | 2495,- | 3 t. 45 min. | 124 | •••• | ••• | 0,44 |
| MOTOROLA V547 | •••• | * | 5 t. 46 min. | 224 | ••• | •••• | 0,93 |
| SIEMENS CF75 | •••• | * | 3 t. 19 min. | 123 | ••• | •••• | 0,8 |

## Orðabók til fartelefonir

Við fartelefonorðabókini í hond, verður vónandi lættari at finna røttu fartelefonina – ella kanska lærir tú tína telefon betur at kenna.

**3G-telefon:** Ein telefon, har tú eitt nú kanst taka upp og senda video. (Kan ikki nýtast í Føroyum enn).
**Bluetooth:** Ein skipan, sum ger tað lættari at flyta myndir og boð yvir á telduna.
**Java:** Eitt forritaramál, sum ger, at til ber at taka niður spøl og ringitónar frá netinum WAP.
**GPRS:** Mobilt internet við høgari ferð.
**GSM:** Netið, sum flestu fartelefonir brúka.
**MMS:** Ein møguleiki, sum ger, at til ber at senda margmiðlaboð, so sum mynd, ljóð og tekst.
**Mobilkontór:** Møguleikarnir hjá telefonini at viðgera notat, t-post og at samskipa álmanakka og kontaktpersónar við telduna.
**Pixel:** Bitarnir, sum talgildar myndir eru uppbygdar av. Tess fleiri pixel, tess betri myndagóðska.
**Polyfonisk ringetone:** Ein ringitóni, sum hevur fleiri ljóð.
**SAR:** Ein stytting av Specific energy Absorption Rate, sum er mátieindin fyri, hvussu stórur partur av kroppinum verður ávirkaður av teimum elektromagnetisku strálunum, frá fartefonini.
**Triband:** Ein skipan, sum fevnir um trý ymisk net, og sum ger, at tú kanst nýta fartelefonina nógva staðni í USA.
**UMTS:** Eitt net, sum er neyðugt, um tú vilt brúka 3G telefonir til eitt nú videotelefoni.
**Wap:** Heitið á mobila internetinum.

## Kosttilskot tikið av hillunum

Danska matvørustýrið krevur, at fleiri kosttilskot verða kallað inn aftur, tí tey innihalda ólógligu plantuna savpalme, (Serenoa repens (Bartr.) Small), sum er undir illgruna fyri, at hava ringa ávirkan á hormonskipanina. Brúkarar verða bidnir um at lata vørurnar inn til handlinin sum tær eru keyptar, ella at koyra tær burtur. Talan er um hesar vørur:

Saw Palmetto, Natures Sunshine selt av LSL Danmark Aps. Selt í heilsuhandlum í íløtum við 100 í hvørjum.

Revitalife Vitex Multi-Blend Tincture Ladies Choise selt av Rheumacure A/S via internetið. Selt í fløskum við 100 ml.

Nature's Ressource Savpalme selt av Apopharm Aps gjøgnum heilsuhandilin Vitalisten. Selt í íløtum við 50 í hvørjum.

Saw Palmetto, íløt í tveimum støddum við 100 og 300 í, Saw Palmetto Max-V, ílat við 60 kapsler umframt Horny Goat Weed, íløt í tveimum støddum við 120 og 360 í, frá Vitaviva selt á www.vitaviva.com